# Arnbjørn til B68

**Alt bendir á, at Rúni Elttør ístaðin verður leikarin, sum skal spæla á vinstra bakki í B36**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað verður plássið hjá Arnbjørn Danielsen, sum Rúni Elttør skal fylla út, nú hann skiftir til B36*

Dimmalætting skrivaði í gjár, at tað eftir øllum at døma var so, at Arnbjørn Danielsen nú skiftir til B68. Tíðindini vórðu mest sum váttað av formanninum í B68, Niklas Davidsen, og mikumorgunin kundi leikarin so eisini sjálvur váttað hesum.

- Tað er soleiðis, at eg ætlandi flyti inn aftur á Toftir í næstum, og tí er tað sjálvandi lættast hjá mær, um eg so eisini kann skifta felag. Hetta havi eg tosað við leiðsluna í B36 um, og tað letur so ikki til, at teir á nakran hátt vilja leggja mær forðingar fyri, sigur Arnbjørn, sum víðari leggur dent á, at hetta als ikki hevur nakað við viðurskiftini hjá sær og B36 at gera.

- Tey hava altíð verið góð, og tað rokni eg eisini við at tey verða framyvir.

Seinasti dysturin, sum Arnbjørn leikti fyri B36 var 2. páskadag ímóti HB. Ætlandi skuldi hann eisini vera við, tá B36 sunnudagin skuldi spæla fjórðingsfinalu móti EB/Streymi, men tann dysturin varð útsettur, og sjálvur varð Arnbjørn eisini skaddur í fríggjadagsvenjingini, so tað verður nú av ongum. Hetta merkir, at hann kann spæla við B68 frá og við øðrum leikumfari í landskappingini.

## Rúni ístaðin

Einki er at ivast í, at hetta er ein góður styrkur hjá toftamonnum at fáa, men líka so lítið er at ivast í, at tað fyri B36 er ein missur av teimum stóru. Arnbjørn hevur seinnu árini talst millum mest virdu verjuleikararnar í føroyskum fótbólti, og einstakar dystir í landsliðsbúnanum er tað eisini vorðið til. Tann seinasti av hesum í fyrsta dystinum hjá Henrik Larsen sum landsliðsvenjara.

Maður kemur tó í mans stað verður sagt, og í B36 tykjast teir longu hava lagt uppfyri, at Arnbjørn ikki verður í hópinum framyvir.

Í blaðnum í gjár skrivaðu vit, at Rúni Elttør ikki longur verður at síggja í KÍ. Sagt varð, at tað enn ikki varð avgjørt, hvat nýggja felag hansara var.

Nú er tað tó staðfest, at B36 verður nýggja felagið hjá Rúna.

Kristian á Neystabø, formaður í B36, váttar, at Rúni Elttør nú verður í B36, og at hann ætlandi skal koma inn á plássið hjá Arnbjørn Danielsen.

- Rúni vandi við okkum í gjár, so hann er mest sum blivin ein partur av liðnum. Enn kann hann tó ikki spæla, tí tað er ov stutt fráliðið, síðani hann leikti seinasta dystin við KÍ, men tað markið er so lokið við landskappingarbyrjan.

Við hesum er sostatt líkt til, at B36 hevur tryggjað sær ein kompetentan avloysara á plássinum. Sum nevnt, so hevur Arnbjørn í fleiri førum verið í landsliðshitanum til júst hetta plássið, og eftir góða árið í fjør, hevur Rúni eisni í fleiri førum verið heilt nær sama hita.

# FM í reiðskapsfimleiki fyri tey eldru um vikuskiftið

**Hetta er á fyrsta sinni, at kappingin verður hildin í høllini á Rituvíkshálsi**

FIMLEIKUR
*Páll Holm Johannesen*



*Fimleikarar lata sera væl at høllini á Rituvíkshálsi. Hóast hon er virkisbygningur, so er hon vælegnað til fimleik. Um vikuskiftið er høllin á Rituvíkshálsi karmur um FM í reiðskapsfimleiki fyri tey eldru.*

*Mynd: Savnsmynd*

FM kappingin í reiðskapsfimleiki verður um vikuskiftið í høllini á Rituvíkshálsi. Seinasta vikuskiftið var FM-kapping fyri dreingir og gentir upp til sjeynda flokk, og hetta vikuskiftið skulu teir eldru fimleikararnir royna seg.

Hetta er á fyrsta sinni, at FM í reiðskapsfimleiki verður hildin í høllini á Rituvíkshálsi. Fimleikararnir lata sera væl at høllini, sum er vælegnað til reiðskapsfimleik. Tað er fimleikafelagið Støkk, sum leigar høllina frá virkinum FJM.

Fimleikafelagið úr Runavík var í hølistrupulleikum, og avtala fekst tí í lag við FJM um leigu av høllini. Síðan januar mánað hevur Støkk vant í høllini. Seinasta vikuskiftið var fyrsta kappingin hildin í høllini, og bæði áskoðarar og fimleikarar vóru stak væl nøgd við umstøðurnar.

Høllin gevur møguleikar hjá fimleikarunum at kappast í beinsving og rekk, sum ikki eru vanligar greinir í Føroyum, men vanligar í øðrum londum.

## Helgi verður við

Stóri heiðursmerkjaslúkarin á oyggjaleikum fyri tveimum árum síðan, Helgi Winther Olsen, verður við í FM kappingini um vikuskift-ið. Hann og Høgni Øster eru báðir upptiknir av teirra felagi í Danmark, men Helgi hevur kortini valt at luttaka í FM kappingini.

Kappingin í reiðskapsfimleiki er skipað í tveimum. Leygardagin kappast bæði gentur og dreingir í fýra amboðum, meðan sunnudagin verður kappast í einum amboði. Genturnar kappast í gólvi, basic line, lopi, biti. Dreingirnir kappast í gólvi, lopi, beinsvingi og ringum.

Fyriskipararnir siga, at bert tey størru feløgini hava boðað frá luttøku. Hetta merkir, at tað vera fimleikarar úr Støkk, Havnar Fimleikafelag og Ljósinum sum um vikuskiftið fara at kappast um FM heitini í reiðskapsfimleiki. Eftir kappingina sunnudagin verður endaliga kunngjørt, hvørjir fimleikarar skulu umboða Føroyar á oyggjaleikunum á Guernsey.




# Hús til sølu



Eini eldri sethús, Tinghúsvegur 37, Tórshavn, til sølu.

Húsini, sum eru bygd í 1940, eru í tveimum hæddum við kjallara. Hjallur er eisini.

Grundøkið er 530 $m^2$.

Nærri fæst at vita við at ringja til

**Demmus Hentze, lrs.**
**og Turið Debes Hentze, adv.**
E. Jalsgøta 1
100 Tórshavn · tlf. 3114650

# Skála skúli

**Søkt verður eftir 2 lærarum í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2003/2004.**

- **1 fulltíðarstarv við 26,5 tímum um vikuna**
- **1 starv við 10 tímum um vikuna**

**Størvini eru vegna lækkað tímatal, avlopstímar og serligan tørv.**

Starvið verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá fyrstalæraranum á tlf. 442118 ella 211360.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 28. mai 2003.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
v/ Rosu Prestá · 480 Skáli

# Skúlin á Fossánesi

Søkt verður eftir lærara at undirvísa 15 tímar um vikuna.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004.

Lønin er sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi áðrenn 24. mai.

**Skúlastýrið við Skúlan á Fossánesi**
v/ John Kára Jacobsen
740 Hvannasund

# Lærarar til Viðareiðis skúla

Viðareiðis Skúli er ein nútímans skúli, ið innan karmarnar í fólkaskúlalógini raðfestir trivnaðin ovast, síðani læring og umhvørvi. Skúlin hevur eina virkisætlan móti happing: Happing ÚR Viðareiðis Skúla.

Í skúlanum ganga komandi skúlaár 50 næmingar, sum verða undirvístir av 5 lærarum, ið mugu duga at skapa virðing og trivnað.

Komandi skúlaár 2003/4 tørvar okkum **tveir lærarar** fyri lærarar í farloyvi at undirvísa fulla tíð.

Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1-27.4 smb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir og møgulig viðmæli skulu sendast til Viðareiðis Skúlastýri v. Lenu Heinesen. Freistin at søkja er úti á miðdegi 20. mai 2003.

Eru spurningar viðvíkjandi størvunum ber til at ringja á tlf. 451193 ella til skúlaleiðaran á tel. 451180 og 451054.

**Viðareiðis Skúlastýri**
v. Lenu Heinsen
FO-760 Viðareiði

# Lærarastørv (vikarar)

Sandoyar Meginskúli søkir við hesum eftir 4 lærarum í tíðaravmarkað starv í skúlaárinum 2003/2004 fyri lærarar í farloyvi og lækkað tímatal.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Møguligar umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi tann 23. mai 2003.

**Skúlastýrið fyri Sandoyar Meginskúla**
v/ Ingibjørn Eldevig
210 Sandi

# Hús ynskist til leigu

J & K Petersen ynskir sethús í Tórshavn ella nærhendis til leigu frá 1. juni.

J & K
tlf. 315060/217532
e-mail: jkp@jkp.fo

# Mimir

Aðalfundur felagsins verður tann 24.05.2003 kl. 15.00 í høli felagsins. Skrá sambært lóg felagsins.

**Nevndin**

# Avloysarar
## til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktaruppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

**Stuðulsfólkaskipanin fyri vaksin ynskir avloysarar, ið m.a.:**

- hava eina sosiala og/ella pedagogiskt kunnaða grundútbúgving og royndir við málbólkum og/ella arbeiðsinnihaldi úr fyrrverandi arbeiðum
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunna átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir – bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

Størvini verða sett 15. juni 2003 ella skjótast aftaná.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um frítíðaravloysarastørv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi, dag-, kvøld- og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er sett til mánadagin 26.05.03, og umsóknir skulu sendast til:

**Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin**
Att.: Regin Johansen
Eirargarði 2 - 2. hædd

# Leirvíkar skúli

Søkt verður eftir lærarum í tíðaravmarkað størv.

- 1 starv 26,5 tímar fyri lærara í farloyvi
- 1 starv umleið 20 tímar vegna eftirútbúgving v.m.

Starvið er tíðaravmarkað til skúlaárið 2003/2004 og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Meira fæst at vita um størvini á telf. 264164, 443164 ella 443234.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera Skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi týsdagin 20. mai 2003.

**Skúlastýrið**
v/ Jákup Tróndheim
520 Leirvík

veitst tú ikki tað?